# Útgávukonsert í Trend Floor

**Trend Floor er mótahandil í Saltangará, ið hevur fingurin á pulsinum, og sum torur, har onnur himprast. Óvanligar mótasýningar eru ikki óvanligar í Trend Floor, og leygarkvøldið er aftur konsert í mótahandlinum, tí tá hevur Høgni Lisberg útgávukonsert í Trend Floor**

Hans Olsen byrjaði klædnahandilin Trend Floor í 2001. Byrjað varð í einum kjallara, men seinni flutti handilin, og hevur í dag góðar umstøður.

– Tað gongur við fullari ferð, og sølan er tann sama sum í fjør, og sølan alt árið er betri, enn í fjør, sigur Hans Olsen.

Sum navnið óivað sipar til, so er Trend Floor ein handil, ið hevur tað nýggjasta nýggja.

– Vit hava klæðir til bæði kyn. Nógv er til tey ungu, men klassisk klæði eru eisini. Vit eru ofta frammi við tí nýggjasta, og hava onkutíð verið ov langt frammi, sigur Hans heldur skemtandi.

Hann heldur, at tá tað snýr seg um móta, so eru føroyingar 100% við.

Øðrvísi mótasýningar hevur Trend Floor eisini verið við til at skipað fyri, og einu ferðina komu modellirnar inn í sýningarhøllina í hvítari limosinu.

Eisini konsertir hava verið í Trend Floor, t.d. við Boys in a Band og Jens Mana Hansen, og nú verður aftur ein konsert í Trend Floor.

### Høgni í Trend Floor

Leygarkvøldið klokkan 19:30 verður útgávukonsert við Høgna Lisberg í Trend Floor.

– Tað er stuttligt, at tónleikur og klæði á henda hátt smelta saman, sigur Hans Olsen.

Sum nakað heilt serstakt, so hevur Høgni valt ymisk pløgg út, og keypir ein hesi, so er nýggja fløgan hjá Høgna við í keypinum.

Tvey fólk arbeiða fulla tíð í Trend Floor, men nú jólini nærkast, er eyka hjálp í handlinum. Heimasíðan www.trendfloor.fo er eisini verd at vitja.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*





















